# Svínoy gjørt ruskavtalu



*Svínoyar kommuna fer at brúka meiri enn ein triðing av síni inntøku í ár til at rudda og fríðka um í bygdini*

**Svínoyar kommunu er nú farið upp í IRF. Nýggi bygdaráðsformaðurin í Svínoy heldur, at tað er alneyðugt at fríðka um í bygdini, og kommunan fer at brúka nógvar pengar til hetta arbeiði í ár**

RUSK
*Eyðun Klakstein*

**Svínoy:** Svínoyar kommuna hevur nú tikið avgerð um at fara við í felagsskapin IRF.

– Avgerðin fer at gera, at vit fáa skipað viðurskifti, tá tað snýr seg um rusk, sigur Pól Sundskarð, sum er bygdaráðsformaður í Svínoyar kommunu.

Avtalan við IRF er ein liður í ætlanini at fríðka um í Svínoynni.

– Rusk og órudd hevur verið til stóran ampa í Svínoy, og fólk, sum hava vitjað í oynni, hava bitið merki í, at tað hevur verið óruddiligt. Tað er hetta vit eru í ferð við at broyta, sigur Pól Sundskarð.

### Nógvar tunnur og plattar

Síðani ársskiftið hevur ein maður arbeitt í ein mánað burtur av við at rudda í bygdini, og hetta hevur gjørt góðan mun.

Ein trupulleiki eru oljutunnirnar, sum oljufeløgini senda til útoyggjarnar.

Hesar hava ligið sløddar allastaðni í oynni, tí skipanin við at senda tær retur hevur ikki riggað nóg væl. Nú verður hetta broytt í einum samstarvi millum fólkið í bygdini og Strandferðsluna.

Seinasta mánaðin eru einar 200 tunnir savnaðar inn og sendar av oynni. Framvegis eru nógvar tunnir eftir at taka upp og senda aftur til oljufeløgini.

Annar trupulleikar eru plattar, sum eisini eru tiknir upp í hópatali farna mánaðin.

### Asfaltera bygdina

Svínoyar kommuna ætlar at brúka einar 300.000 krónur til umhvørvið í ár. Hetta er meiri enn ein triðingur av væntaðu inntøkuni hjá kommununi.

– So nógvir pengar verða ikki nýttir á hvørjum ári til at rudda og fríðka um í oynni, men vit meta, at tað er neyðugt at brúka hesar pengarnar nú, sigur Pól



Sundskarð.

Kommunan fer at gera ruskplássið niðri á kaiini í standa, so allir neyðugur hentleikar verða at finna har. Somuleiðis ætlar kommunan at asfaltera bygdina, og eina verð í vár verður væntandi almennur ruddingardagur.

– Síðani eg gjørdist bygdaráðsformaður, havi eg lisið gerðabókina hjá kommununi, og har sæst, at tað hevur verð tosað um trupulleikarnar av ruskinum gjøgnum nógv ár.

– Nú er lættari enn nakrantíð at sleppa av við rusk, men tað skal eisini ein hugburðsbroyting til millum fólkið. Tað skal ikki kennast natúrligt, at rusk sløðist í bygdini og kring um í náttúruni, sigur Pól Sundskarð.

*– Nú er lættari enn nakrantíð at sleppa av við rusk, men tað skal eisini ein hugburðsbroyting til millum fólkið. Tað skal ikki kennast natúrligt, at rusk sløðist í bygdini og kring um í náttúruni, sigur Pól Sundskarð, borgarstjóri í Svínoy*

### Fólk í starv

Tað verður nú IRF, sum fær ábyrgdina av at savna ruskið hjá húskjunum í bygdini.

Higartil hava fólk sjálvi avleverað ruskið, men framyvir verður tað heintað eina ferð um vikuna. Ein maður skal í lutvíst starv fyri at taka sær av hesi uppgávu.

– Málið hjá okkum er fáa bygdina ruddiliga og reina, sigur Pól Sundskarð.

# PS provokerar

**PS úr Klaksvík er ein av teimum 9 bólkunum, sum í kvøld fara at kappast í triðja innleiðandi umfarinum í Prix Føroyum**

PRIX FØROYAR
*Eyðun Klakstein*

Fólk kunnu vænta øðrvísi undirhald frá bólkinum PS, tá innleiðandi umfarið í Prix Føroyum verður í Klaksvík í kvøld.

– Tað ber illa til at skelkað fólk longur, tí alt er roynt áður. Men vit ætla at spæla villan tónleik við nøkrum sermerktum tekstum, sigur Jógvan á Høvdanum, yngri, sum er frontfigurur í bólkinum.

PS spælir harðan rocktónleik, og helst fer onkur av yrkingunum at arga ávís fólk.

### Gulli er við

Umframt PS verða tveir aðrir lokalir bólkar við í Prix Føroyar kappingini í KÍ-høllini.

Gulli Johansen, sum eisini var við fyri tveimum árum síðani, fer hesaferð at spæla undir navninum Human Caos. Gulli fæst mest við harðan rocktónleik, og hesaferð verða eisini modernaðir tónar í tónleikinum.

Harafturat verður bólkurin IRIS úr Klaksvík eisini við.



*PS undir einum av seinastu venjingunum undan Prix Føroyar kappingini. Bólkurin hevur vant í Lognbrá farnu vikurnar. PS spælir harðan rock við argandi yrkingum*

### Drúgvar royndir

Skal tosast um nakran favoritt at vinna kappingina í Klaksvík, má All that Rain nevnast.

Hetta er bólkur, sum er mannaður við limum úr bólkinum Kjølar, sum áður hevur staðið seg sera væl í Prix Føroyum. All that Rain eru væl samanspældir, og teir hava drúgvar royndir á palli.

Bólkurin Tám er eisini mannaður við royndum tónleikarum, og Sólvá Ford er sangari í bólkinum. Daybreak úr Havn er mannaður við dugnaligum tónleikarum, og hesin bólkurin kann fara at gera rættiliga vart við seg í árins kapping.

Bólkarnir Krit og Líla Rúm úr Havn og Hokus Pokus úr Nólsoy verða eisini við í kappingini í kvøld.

### Ongar glasfløskur

Prix Føroyar kappingin verður hildin í KÍ-høllini, og dyrnar verða latnar upp í kvøld klokkan 20.30, og fyrsti bólkurin fer á pallin klokkan 21.30.

Serliga valdir dómarar fara at gera av, hvørjir tveir bólkar sleppa við í finaluna, sum verður í Norðurlandahúsinum í apríl mánaði.

Fyrireikararnir hava sett forboð fyri, at fólk taka glasfløskur við til tiltakið, tí hesar fløskur hava verið til ampa í fyrstu tveimum innleiðandi umførunum.



*Gulli Johansen fer aftur í ár at spæla sermerktan rocktónleik í Prix Føroyar kappingini*

## Grýluveitsla í Badmintonhøllini

Leygarkvøldið verður stór grýluveitsla í Badmintonhøllini í Havn.

Ársins DJ 2001, Kári Annand Berg, fer at standa fyri tónleikinum, umframt at stórt multimediashow eisini verður sett upp.

Dansipallar verða settir upp, og hesir skulu nýtast til grýlukappingarnar, sum verða hetta kvøldið.

Valdar verða vakrasta, ljótasta, stuttligasta og mest ræðandi grýlan, og hesar fáa allar virðislønir.



# Flutningsstuðulin heldur fram

**Jørgen Niclasen mælir løgtinginum til at samtykja eitt uppskot, sum heimilar landsstýrismanninum at halda fram við at gjalda bátum, virkjum og uppboðssølum stuðul, tá tey flyta fisk til virkingar í øðrum oyggjum.**

FLUTNINGSSTUÐUL
*Magnus Dam*





*Skipanin við flutningsstuðuli, sum fór úr gildi á nýggjárinum, eigur at halda fram í eitt ár afturat, heldur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður. Bátár og uppboðssølur fáa millum 10 og 25 oyru/kilo í stuðuli*

Skipanin við at lata útróðrarbátum og virkjum stuðul, tá tey flyta fisk til millum firðir og sund eigur at halda fram í ár. Tað mælir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, til í einum uppskotið, sum hann hevur lagt fyri løgtingið.

Lógin, sum heimilar landsstýrismanninum at gjalda flutningsstuðul, fór úr gildi á nýggjárinum, og Jørgen Niclasen skjýtur upp, at lógarheimildin verður longd eitt ár afturat.

Skipanin við flutningsstuðli kostaði í fjør millum tríggjar og hálvafjórðu millión krónur, og landsstýrismaðurin roknar við, at kostnaðurin í ár verður umleið tríggjar milliónir krónur. Orsøkin er, at stuðulsupphæddirnar vórðu lækkaðar við kunngerð i mai í fjør.

Tað eru serliga uppboðssølurnar og landingarmiðstøðirnar, sum fáa ágóðan av skipanini við flutningsstuðli. Tær fingu í fjør nakað omanfyri tvær milliónir krónur í stuðuli fyri at flyta fiskin frá uppboðssøluni ella landingarmiðstøðini til virkingar í øðrum oyggjum.

Útróðarmenninir høvdu fram til november í fjør fingið 70.000 krónur í flutningsstuðli. Útróðrarbátar fáa upp til 10 oyri/kilo í stuðli, tá ið fiskurin verður fluttur frá økjum, har eingin uppboðssøla er, til nærmastu uppboðssølu. Uppboðssølurnar og landingarmiðstøðirnar fáa sambært lógini millum 15 oyru/kilo og 25 oyru/kilo í stuðli, alt eftir hvussu lang flutningleiðin er.

Uppskotið hjá Jørgen Niclasen kom til fyrstu viðgerð í løgtinginum í gjár.

# Vilja nú hava greið boð

**Føroya Arbeiðarafelag hevur biðið ein politikara frá hvørjum flokki koma á á aðalfundin hjá felagnum at greiða frá, hvat fer at henda við eftirlønarspurninginum**

EFTIRLØN
*Áki Bertholdsen*



*Ingeborg vil hava greið boð frá politikarunum um eftirlønina*

Føroya Arbeiðarafelag vil nú hava greið boð frá politikarunum um, hvat fer at henda við málinum um ta nýggju eftirlønarskipanina, sum er fráboðað.

Føroya Arbeiðarafelag hevur ársaðalfund 9. 10. mars. Og í tí sambandinum hevur felagið biðið ein politikara úr hvørjum flokki um at koma á fundin at greiða frá um ætlaðu eftirlønarskipanina.

Ingeborg Vinther sigur, at tveir tímar eru settir av til fundin við politikararnar. Á fundinum er ætlanin at fáa at vita frá teimum, hvat fer at henda við málinum um eina framtíðar eftirlønarskipan og, hvat flokkarnir vilja og standa fyri í málinum.

Hon sigur, at støðan viðvíkjandi eftirlønini er heilt ótolandi, tí ongin veit, hvussu tey skulu fyrhalda sær.

– Landsstýrið hevur nú í langa tíð gjørt greitt, at tað fer at gera eina framtíðar eftirlønarætlan.

– Men tað spyrst onki burturúr og tí vita vit ikki, hvussu vit skulu fyrihalda okkum.

Ingeborg Vinther sigur, Føroya Arbeiðarafelag hevur sjálvt sína hugsan um eina framtíðar eftirlønarskipan

M.a. vilja tey hava at vita, hví samhaldsfasti ikki verður styrktur, so at hann kann veita eina veruliga eftirløn, heldur enn at gera eina nýggja skipan afturat. Tey vilja eisini hava at vita, hví lógin ikki verður broytt, so at Føroya Arbeiðarafelag fær gjørt eina samhaldsfasta skipan fyri limir sínar.

